# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Eg veit ikki hví vit gera so. Vit spæla ein fínan dyst í Svøríki, og so koma vit heim og gera hetta*

*Fróði Benjaminsen, HB*



*Rúni Nolsøe hevur ikki skaffað tey úrslit, ið HB hevði vónað og í gjár tapti hann fyri uppflytarunum ÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# HB-venjarin í klønum tráð?

**Rumbul í hópinum, ónøgdir leikarar og ein venjari, ið ikki skaffar neyðugu úrslitini. Standurin í HB er ikki góður, og venjarin tykist at hanga í klønum tráð**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

HB er tíggju stig aftanfyri EB/Streym. Í gjár høvdu teir møguleika at hála inn á oddaliðið, men henda møguleika misnýttu teir. Ein strika í rokningini hjá høvuðsstaðarfelagnum, og sum skilst er hetta ikki tað einasta, ið ikki er heilt sum tað skal vera.

### Vatnhamar liðugur í HB?

Sjónligasta dømi um hetta í gjár, var málverjin Tróndur Vatnhamar. Ella eykamálverjin Tróndur Vatnhamar. Tróndur hevur annars staðið í málinum flestu dystirnar hjá HB í ár – og hevur staðið væl. Nú er Tróndur Vatnhamar avsettur. Hann byrjaði ikki inni, tá HB spældi seinna Intertoto-dystin móti Elfsburg. Marcin Dawid stóð millum stengurnar, og tað gjørdi hann eisini í Fuglafirði í gjár. Hetta var Tróndur sjónliga ónøgdur við.

Meðan HB-liðið í felag kom til Fuglafjarðar, kom Tróndur koyrandi einsamallur í egnum bili. Tá hinir eykaleikararnir hugnaðu sær við bóltspæli í steðginum, sat Tróndur á beinkinum – einsamallur. Vit hava royndt at fáa greiði á, hvat trupulleiki hansara er, men Tróndur ynskir ikki at úttala seg.

– Eg havi fingið eina frágreiðing, sum eg ikki kann góðtaka, er stutta svar hansara, tá vit í morgun spurdu hann, hví hann er settur av liðnum. Hvat hetta ber við sær er ilt at siga, men í Fuglafirði í gjár var eyðsæð, at Tróndur var ein stak ónøgdur maður.

Ein annar maður, sum heldur ikki tóktist at vera heilt nøgdur, var Jákup á Borg. Hann varð tikin út, tá tríggir minuttir restaðu av dystinum, og áðrenn dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð, var Jákup á Borg á veg niðan í umklæðingarrúmið.

### Kroystur venjari

Hetta er ikki fyrstu ferð, at rumbul er í HB-leguni í ár. Fyrr í ár varð Jákup á Borg frátikin sum liðformaður. Eingin almenn frágreiðing kom úr HB um hesa avgerð. Um sama mundi framdi venjarin, Rúni Nolsøe, ógvusligar broytingar á liðnum. Til dystin móti NSÍ tann 18. mai í ár, hevði Rúni Nolsøe sett bæði Andrew av Fløtum og Christian Høgna Jacobsen á beinkin. Hetta sum ein avleiðing av, at HB ikki hevði skotið mál í samfullar 450 minuttir. Avgerðin gav bonus, HB skoraði trý mál – Jákup á Borg eitt og Christian Høgni Jacobsen tvey.

Hesir somu leikarar, sum tann 18. mai vórðu avsettir, levaraðu ikki vøruna í gjár. Tað hava teir heldur ikki gjørt í fleiri øðrum dystum. Og tá bestu leikararnir spæla rættiliga langt frá tí optimala, ber illa til hjá HB at vinna dystir. Spurningurin er, hvat HB-venjarin nú skal finna upp á? Og spurningurin er, hvat leiðslan í HB skal finna upp á, tí tað ber illa til at liva við einum venjara, sum ikki skaffar neyðugu úrslitini, og landsliðsleikarar, ið spæla illa.

### Formaðurin onga viðmerking

Vit ringdu til formannin í HB, Birgir Enghamar, og spurdu hann, um alt er sum tað eigur at vera í HB.

– Tað einastu viðmerkingina eg vil gera er, at í fótbólti gongur tað upp og niður, og í løtuni gongur tað ikki upp hjá okkum, sigur Birgir Enghamar. Spurdur um tað er galdandi bæði á og uttanfyri vøllin, sigur Birgir Enghamar, at hann ikki hevur fleiri viðmerkingar enn tað sama.